# Nevndir og endamál

Útskrivað tann
24. april 2024

| Nevnd | Endamál | Ráð |
|---|---|---|
| ALS-stýrið | Situr fyri og hevur ábyrgdina av arbeiðsloysisskipanini | Umhvorvi |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin | At umsita stovnsfæ í grunninum og tryggja øllum íbúgvum landsins eina arbeiðsmarknaðareftirløn | FMR |
| Arbeiðsumhvørvisráðið | Skal geva arbeiðsmarknaðinum høvi til at ávirka tey tiltøk, sum skulu gerast fyri at fáa eitt heilsugott og trygt arbeiðsumhvørvi | Umhvorvi |
| Blákrossheimið | Leiðslan á heiminum hevur ábyrgd av virkseminum, sum er at veita viðgerð til fólk við rústrupulleikum. | HMR |
| Búagrunnurin | Endamálið við grunninum er at stuðla føroyskt vinnulív, her serliga fiskivinnuna. | UVMR |
| Búskaparráðið | t fylgja við búskaparligum viðurskiftum í landinum og koma við óheftari ráðgeving og frágreiðing um gongdina. | FMR |
| Býarskipanarnevndin | Ummæla býarskipanarmál, byggisamtyktir o.a. | Umhvorvi |
| Dansk-færøsk kulturfond | Miðling av mentan millum Føroyar og Danmark umframt Føroyar og Grønland | AMMR |
| Dáturáðið | Er ein óheftur fyrisitingarmynduleiki, eftirlit við allari viðgerð, sum lógin fevnir um | LMR |
| Demokratia | Nevndin hevur til endamáls at fáa javnari kynsumboðan í politikki. | AMMR |
| Depilsráðið fyri Glasir | Depilsráðið hevur til endamáls at styrkja samband og samskifti úteftir og dygd og menning inneftir. Depilsráðið skal veita rektaranum ráð og gera tilmæli viðvíkjandi fyriskipan, útbúgvingum og strategi fyri skúladepilin innan fyri karmarnar av stk. 2. | BUMR |

| Nevnd | Endamál | Ráð |
|---|---|---|
| EL-nevndin | Elnevndin hevur ábyrgdina av eltrygdini viðvíkjandi framleiðslu, flutningi, og nýtslu av sterkstreymi, sbr.løgtingslog um sterkstreymsútbúnað og løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarum. | Umhvorvi |
| Etiska Ráðið | Etiska ráðið hevur til endamáls at fremja og styrkja kjak og vitan um etiskar spurningar, ið knýta seg til heilsufakligt virksemi á heilsuøkinum, almannaøkinum og kommunala økinum. Harumframt hevur ráðið til endamáls at gera almennar myndugleikar og borgarar betur førar fyri at taka støðu í etiskum spurningum. Ráðið er við til at byggja upp almenna vitan og førleikar um etiskar spurningar. | HMR |
| Fakliga nevnd sambært §39, stk. 4 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur | Nevndin ger tilmæli til landsstýrismannin í teimum førum, tá ið ivamál er, um barn er fevnt av dagstovnalógini ella av forsorgarlógini | AMMR |
| Faknevnd at viðgera og játta stuðul til gransking | Endamálið er at viðgera og játta stuðul til gransking (komin fyri Granskingarnevndina, sum er tikin av) | BUMR |
| Farsóttarnevndin | Farsóttarnevndin hevur til endamáls at seta neyðug tiltøk í verk fyri at fyribyrgja, at alment vandamiklar sjúkur og aðrar ávísar smittandi sjúkur spjaðast í Føroyum. | HMR |
| Fasti gerðarrættur (dómarar) | Fasti gerðarrættur skal loysa trætur, ósemjur og ivamál á arbeiðsmarknaðinum sambært hesi skipan og felags avtalum og sáttmálum millum partanna á arbeiðsmarkaðinum | Umhvorvi |
| Fasti gerðarrættur (nevndin) | Fasti gerðarrættur skal loysa trætur, ósemjur og ivamál á arbeiðsmarknaðinum sambært hesi skipan og felags avtalum og sáttmálum millum partanna á arbeiðsmarkaðinum. Og fasti gerðarrættur skal eisini savna, menna og kunna um føroyskan arbeiðsmarknaðarrætt. | Umhvorvi |
| Filmshúsið | - | UVMR |
| Fiskivinnuráðið | Ráðgeva landsstýrismanninum í fiskivinnumálum | FISK |

| Nevnd | Endamál | Ráð |
|---|---|---|
| Fjølmiðlanevndin | Taka avgerð í málum, ið viðvíkja brot á góðan fjølmiðlasið | LMR |
| Fólkaskúlagrunnurin | Endamálið við grunninum er at veita granskingarstyrk til verkætlanir í námsfrøði. Grunnurin skal serliga stuðla verkætlanum, sum kveikja og menna arbeiðið í føroyska fólkaskúlanum. | BUMR |
| Fólkaskúlaráðið | Uppgávan hjá Fólkaskúlaráðnum er at geva landsstýrismanninum ráð í øllum málum um fólkaskúlan, og kann Fólkaskúlaráðið harumframt ráða landsstýrismanninum til at seta í verk royndar- og menningarvirksemi og granskingarverkætlanir. | BUMR |
| Fólkatingsvalnevndin | At skipa fyri fólkatingsvalið | LMR |
| FO-Ráðið | FO-ráðið er myndugleiki, ið sambært teimum av landsstýrismanninum í vinnumálum góðkendu viðtøkum, hevur fingið ábyrgdina av umsitingini og nýtsluni av landaøkinum .fo á internetinum. | UVMR |
| Fornminnisnevndin | Fornminnisnevndin er ein tilmælandi nevnd hjá landsstýrismanninum við mentamálum, sum hevur evstu ábyrgd í friðingarmálum. | AMMR |
| Føroya Realkredistovnur (umboðsnevnd) | Ráðgevandi nevnd fyri stjórnina í Realinum | LMS |
| Føroya Realkreditstovnur | Veita lán við veð í ognum v.m. við heimstaði í Føroyum. | LMS |
| Føroya Váðaráð | Hevur sum uppgávu at eyðmerkja og hava eftirlit við systemiskum fíggjarligum váðum í síni heild, at bera fram eygberingar viðvíkjandi systemiskum fíggjarligum váðum í fíggjarkervinum í Føroyum, at koma við ávaringum um vaksandi váðar í fíggjarkervinum í Føroyum, at koma við tilmælum um átøk, ið kunnu minka um ella byrgja fyri systemiskum fíggjarligum váðum í fíggjarkervinum í Føroyum, og koma við úttalilsum um fíggjarligar systemiskar váðar í Føroyum. | UVMR |

| Nevnd | Endamál | Ráð |
|---|---|---|
| Føroyagrunnurin frá 1971 | At eiga partapening í JFK Trol, veita stuðul, seta á stovn og eiga vinnurekandi partafeløg | LMS |
| Føroyska UNESCO-nevndin | Endamálið hjá nevndini at fremja UNESCO arbeiðið í Føroyum, at virka sum ráðgevi hjá landsstýrinum í UNESCO málum og hjá føroysku sendinevndini á aðalfundinum hjá UNESCO. | AMMR |
| Føroyskt kirkjumál | Grunnur, ið gevur út bøkur til kirkjubrúk, og til kirkjufólk at brúka við hús, t.d. Lestrarbøkur, andaktsbøkur og sálmabøkur. | AMMR |
| Framtaksgrunnurin (Framtak) | Grunnurin hevur til endamáls at gera íløgur í nýggjar ella víðkaðar verkætlanir og feløg, ið hava verið gjøgnum munandi broytingar ella skuldaumlegging. Íløgurnar verða gjørdar eftir marknaðarbúskaparligum treytum. | UVMR |
| Fróðskaparsetur Føroya | Stýrið er evsti myndugleiki á stovninum og hevur ábygdina av virksemi stovnsins mótvegis landsstýrismanninum. Stýrið hevur yvirskipaðu ábyrgdina av, at ásetingarnar í lógini og øðrum fyriskipanum um virksemi stovnsins verða fylgdar | BUMR |
| Grannskoðaraeftirlitið | Endamálið við Grannskoðaraeftirlitinum er at góðskukanna grannskoðaravirki" | UVMR |
| Grannskoðaranevndin | Endamál nevndarinnar er at viðgera kærur um, at grannskoðari hevur sett til viks skyldur sínar eftir grannskoðaralógini . | UVMR |
| Heilbrigdi | Leiðslan á heiminum er ein nevnd, sum hevur 5 limir, sum verða tilnevndir av avvarðandi landsstýrismanni eftir tilmæli frá nevndini fyri Viðgerðarheimið Sjálvsognarstovnunum Heilbrigdi, og skulu hesi umboða ávikavist politisku skipanina, løgregluna, sjúkrahúsverki, kommununa og brúkarar | HMR |

| Nevnd | Endamál | Ráð |
|---|---|---|
| Heilivágsráðið | Heilivágsráðið skal ráðgeva landsstýrismanninum og áseta leiðreglur um nýtsluna, og hava eftrilit við nýtsluni av serstøkum sjúkrahúsheilivági í sjúkrahúsverkinum. | HMR |
| Heilsunevndin fyri sjófólk | Heilsunevndin tekur endaligu fyrisitingarligu avgerðina viðv. málum, sum Sjóvinnufyrisitingin, reiðarí ella sjómaður leggur fyri nevndina viðvíkjandi úrsliti av læknakanning hjá sjófólki. | UVMR |
| Hvíldarheimið Naina | Nevndin hevur yvirskipaðu ábyrgdina av virkseminum. | HMR |
| Íleggingargrunnurin fyri Føroyar | Lán til íløgur í undirstøðukervið til frama fyri menning og vinnulívi | LMS |
| Íverksetarahúsið | Endamálið við Íverksetarahúsinum er at birta uppundir íverksetan av nýggjum vinnum og at menna verandi vinnur. Tað verður m.a. gjørt við at ráðgeva, skipa fyri skeiðum og øðrum útbúgvingarligum virksemi, umframt at útleiga høli til íverksetarar, sum ætla at byrja egna fyritøku. | UVMR |
| Javnstøðunevndin | Javnstøðunevndin hevur eftirlit við, at lógin um javnstøðu verður hildin, gevur ráð í javnstøðuspurningum og ger tilmæli í javnstøðumálum. | AMMR |
| Jólamerkjagrunnurin | Sambært viðtøkunum hevur grunnurin til endamáls at býta út ágóðan av søluni av jólamerkjum, ið Posta gevur út á hvørjum ári. Ágóðin verður býttur út til frama fyri børn og ung til stovnar og feløg. | AMMR |
| Kappingarráðið | Kappingarráðið hevur eftirlit við kappingarlógini og reglum, givnar við heimild í lógini. | UVMR |
| Kirkjuráð, eitt í hvørjari av 61 kirkjusóknunum | Umsita kirkjukassarnar, gera av, hvussu kirkjutænastan skal skipast, og varða av kirkjubygninginum vegna kirkjufólkið á staðnum. | AMMR |

| Nevnd | Endamál | Ráð |
|---|---|---|
| Landbúnaðarstevna Eysturoyar Sýsla | Landbúnaðarstevnurnar virka sum dómstólar viðv. landbúnaðar- og jarðarviðurskiftum | UVMR |
| Landbúnaðarstevna Norðoya Sýsla | Landbúnaðarstevnurnar virka sum dómstólar viðv. landbúnaðar- og jarðarviðurskiftum | UVMR |
| Landbúnaðarstevna Sandoyar Sýsla | Landbúnaðarstevnurnar virka sum dómstólar viðv. landbúnaðar- og jarðarviðurskiftum | UVMR |
| Landbúnaðarstevna Streymoyar Sýsla | Landbúnaðarstevnurnar virka sum dómstólar viðv. landbúnaðar- og jarðarviðurskiftum | UVMR |
| Landbúnaðarstevna Suðuroya Sýsla | Landbúnaðarstevnurnar virka sum dómstólar viðv. landbúnaðar- og jarðarviðurskiftum | UVMR |
| Landbúnaðarstevna Vága Sýsla | Landbúnaðarstevnurnar virka sum dómstólar viðv. landbúnaðar- og jarðarviðurskiftum | UVMR |
| Landsbanki Føroya | Nevndin ger reglur fyri virksemið hjá nevnd og stjóra. Nevndin ger neyvari ásetingar fyri, hvussu gjaldføri landsins skal umsitast. Nevndin ger ásetingar fyri umsiting av landsins skuld. Nevndin tryggjar, at Landsbanki Føroya fylgir almennum reglum, sum eru galdandi fyri almennar stovnar. | FMR |
| Leigunevndin | Nevndin tekur avgerð í trætumálum millum leigara og útleigara | Umhvorvi |
| Leiklistaráðið | Stýrið fyri Tjóðpall Føroya samstarvar tvørtur um leiklistalig og mentanarlig mørk. Ger tilmæli um stuðul til yrkisleiklist | AMMR |
| Løgtingsvalnevndin | At skipa fyri løgtingsvalið | LMR |
| Loyvisnevndin | Nevndin veitir skeinkiloyvi | LMR |

| Nevnd | Endamál | Ráð |
|---|---|---|
| Málráðið | Uppgávan hjá Málráðnum er: at røkja, menna og verja føroyska málið, at vegleiða, ráðgeva og gera niðurstøður í málspurningum og at áseta føroyska stavseting. | AMMR |
| Maritima Útbúgvingarráðið | Maritima Útbúgvingaráðið er sett at ráðgeva landsstýrismanninum í øllum málum um útbúgving av fólki á sjónum. | BUMR |
| Markamótsnevndin | Taka avgerðir um handfaring av markamótum í mun til aðra lóggávu | AMMR |
| Mentanargrunnur Landsins | Endamál grunsins er at styðja starv fyri føroyskum máli, bókmentum, list, vísindum og øðrum mentanarmálum bæði hjá leikum og lærdum | AMMR |
| Metingarnevndin (fyrr Ognartøkumetingarnevnd) | Meta um ognartøku | Umhvorvi |
| Miðlastuðulsnevndin | Nevndin tekur endaliga avgerð innan fyrisitingina um miðlastuðul. | AMMR |
| Náttúrufriðingarnevdnin fyri Norðoyar sýslu | Viðgera mál um loyvi til bygging,vegagerð o.a.á økjum sum eru fevnd av §2-4 og §6 | Umhvorvi |
| Náttúrufriðingarnevndin fyri Eysturoyar sýslu | Viðgera mál um loyvi til bygging,vegagerð o.a.á økjum sum eru fevnd av §2-4 og §6 | Umhvorvi |
| Náttúrufriðingarnevndin fyri Sandoyar sýslu | Viðgera mál um loyvi til bygging,vegagerð o.a.á økjum sum eru fevnd av §2-4 og §6 | Umhvorvi |
| Náttúrufriðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu | Viðgera mál um loyvi til bygging,vegagerð o.a.á økjum sum eru fevnd av §2-4 og §6 | Umhvorvi |
| Náttúrufriðingarnevndin fyri Suðuroyar sýslu | Viðgera mál um loyvi til bygging,vegagerð o.a.á økjum sum eru fevnd av §2-4 og §6 | Umhvorvi |
| Náttúrufriðingarnevndin fyri Vága sýslu | Viðgera mál um loyvi til bygging,vegagerð o.a.á økjum sum eru fevnd av §2-4 og §6 | Umhvorvi |

| Nevnd | Endamál | Ráð |
|---|---|---|
| Navnanevndin | Leiðbeinandi lista við fornøvnum endurskoðar hann javnan,ráðgeving um fólkanøvn o.a. | LMR |
| Nevndin fyri brotsverksoffur | Nevndin tekur støðu til, um endurgjald kann gevast offrum fyri brotsverki | LMR |
| Nevndin fyri Norðurbryggjuna | Skabe og opretholde en ramme for aktiviteter indenfor samfundsforhold, kultur, forskning og uddannelse samt ti repræsentative formål, som har relation til Grønland, Island, Færøerne og Danmark samt eventuelt andre lande med tilknyting til det nordatlaniske område. | LMS |
| P/F Atlantic Airways | Endamál felagsins er at reka flogferðslu. | LMR |
| P/F Elektron | At veita KT-tænastur og at menna, útvega skipanir til peningastovnar, tryggingar, almennar stovnar og grunnar. | LMS |
| P/F Eystur- og Sandoyartunlar | P/F Eystur- og Sandoyartunlar skal byggja og reka sambandið millum Streymoy og Eysturoy eins og sambandið millum Streymoy og Sandoy. | LMS |
| P/F Fiskaaling | Endamál felagsins er at granska, menna og ráðgeva innan aling av vatnlivandi djórum og plantum og innan biotøkni. | UVMR |
| P/F Føroya Tele | Endamál felagsins er at hava um hendur og reka fjarskiftiskervi og fjarskiftistænastu. | LMR |
| P/F Norðoyatunnilin | Felagið hevur til endamáls at gera tunnil millum Eysturoy og Borðoy og hartil hoyrandi vegagerð, hava rakstur av tunlinum um hendi umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemi. | LMS |
| P/F Posta (Postverk Føroya) | Endamál felagsins er at reka postvirksemi og aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemi. | LMR |
| P/F Suðuroyartunnilin | P/F Suðuroyartunnilin skal gera undirsjóvartunnil millum Sandoy og Suðuroy við hartil hoyrandi vegagerð, at hava rakstur av tunlinum um hendi og at reka annað virksemi í hesum sambandi. | LMS |

| Nevnd | Endamál | Ráð |
|---|---|---|
| P/F Vága Floghavn | Endamál felagsins er at reka floghavnsvirksemi. | LMR |
| P/F Vágatunnilin | Endamál felagsins er at útvega fast samband millum Streymoy og Vágoy, hava rakstur og fast sambandinum um hendi umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemi. | LMS |
| P/F Visit Faroe Islands | Endamálið er í samstarvi við vinnuna at samskipa og marknaðarføra Føroyar sum ferðafólkaland til tess at skapa vøkstur innan føroyska ferðavinnu. | UVMR |
| Politiøkisráðið | Formålet med kredsrådets møder er at sikre, at der er en lokal forankring af politiets arbejde. Politiet skal derfor på kredsrådsmøderne orientere om sit arbejde og sine mål og dermed give medlemmerne af kredsrådet indsigt i politiets arbejde og sikre, at dette sker i samsvar med det lokale politiske niveau. | LMR |
| Próstadømisráðið | "Fíggjarnevnd" fólkakirkjunnar vv. teimum 61 kirkjukassunum kring landið, ummælismyndugleiki, serliga vv bygningum fólkakirkjunnar, og annað. | AMMR |
| Próvtøkunevndin (grannskoðan) | Endamál nevndarinnar er at fyriskipa próvtøkuhald og próvtøkudøming fyri grannskoðarar . | UVMR |
| Próvtøkunevndin (kaving) | Nevndin hevur til endamáls at góðkenna kavaraskúlar og -skeið, umframt at skipa fyri próvtøkum í sambandi við kavaraprógv. | Umhvorvi |
| Ráðgevandi nevnd fyri Musikkskúlar | Hjálpa musikkskúlaleiðsluni | BUMR |
| Ráðgevandi nevndin fyri altjóða menningarsamstarv | Nevndin skal geva landsstýrismanninum ráð til at fremja lógina um menningarsamstarv í verki. Harumframt verða allar umsóknir um stuðul til menningarsamstarv lagdar fyri nevndina til tilmælis. | LMR |
| Ráðgevandi nevndin fyri Norðurlandahúsið | Ráðgevandi nevnd hjá stýrinum | AMMR |

| Nevnd | Endamál | Ráð |
|---|---|---|
| Ráðgevandi nevndin hjá Studna | Endamálið við nevndini er, at Studni kann ráðføra seg við hana í sambandi við t.d. góðkenning av útbúgvingum. | BUMR |
| Ráðið fyri Ferðslutrygd | Endamál ráðsins er at gera ferðsluna tryggari og betra ferðsluvanar við upplýsing og fjølbroyttum fyritaksemi. | FISK |
| Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan | Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan ráðgevur Føroya Landsstýri og vinnu um yvirskipaða føroyska politikkin, sum fevnir um gransking, menning og nýskapan. | BUMR |
| Revsirættarliga ráðið | Ráðið viðger og ummælir revsirættarligar spurningar og aðrar meginregluligar spurningar o.a. | LMR |
| Samstarvsráðið | Endamál ráðsins er at ráðgeva landsstýrismanninum og Skipaeftirlitinum viðv. trygd á sjónum, arbeiðsumhvørvi umborð og havdálking . | UVMR |
| Semingsstovnurin | Endamál stovnsins er at útinna seming í sambandi við arbeiðsósemjur á privata arbeiðsmarknaðinum. | Umhvorvi |
| Serflutningsskipan Landsins | Stýrisbólkurin sum landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum setir eftir tilmæli frá pørtunum. Hevur mótvegis landsstýrismanninum ábyrgdina av, at skipanin virkar eftir ætlan | AMMR |
| Siglingarráðið | Siglingarráðið tekur avgerð í málum, sum sambært lógini um trygd á sjónum kunnu verða kærd til ráðið, undir hesum um siglingar- og havnabann. | UVMR |
| Sjálvsognarstovnur á Sólteigi og Eysturstræti | Endamálið er at hýsa sinnisliga sjúkum fólki og leggja til rættis umsorgarliga viðgerð. Stýrið hevur evstu ábyrgd fyri virkseminum. | AMMR |
| Sjálvsognarstovnurin Tórshavnar Privata Vistarheim | Stýrið hevur evstu ábyrgd fyri virkseminum | AMMR |
| Sjálvsognarstovnurin Umlættingarheimið "Dáin" | Stýrið hevur evstu ábyrgd fyri virkseminum | AMMR |

| Nevnd | Endamál | Ráð |
|---|---|---|
| Sjóvinnuráðið | Ráðið viðger kærur um avgerðir eftir manningarlógini . | UVMR |
| Sjúklingaráðið | Uppgávurnar hjá Sjúkligaráðnum fevna um 1) at ráðgeva landsstýrismanninum í sambandi við uppskot til lógir og kunngerðir, um uppskotini hava týdning fyri veitingar til sjúklingar, og 2) at viðgera mál av generellum og prinsipiellum týdningi fyri veitingar til sjúklingar. Sjúklingaráðið kann ikki viðgera ítøkilig persónsmál. | HMR |
| Skógfriðingarnevndin | Viðgera mál um skógarvøkstur o.a. | Umhvorvi |
| Sp/f Ítróttarvedding | At býta út pening frá Dansk Spil | LMR |
| Staðarnavnanevndin | Umsitur heimildina at løggilda staðarnøvn. | AMMR |
| Sterilisatiónsnevndin | Nevndin viðger og gevur loyvi til sterilisatión og kastrering | LMR |
| Stiftsstjórnin | Fyrisitingarliga leiðsla fólkakirkjunnar, stjórnar Kirkjugrunninum og Tiltaksgrunninum. Umsitur m. a. lønir til prestarnar, prestagarðarnar og landskirkjuskattin. Stiftsstjórnin hevur eisini yvirefterlit við próstadømisráðnum og kirkjuráðunum | AMMR |
| Stýrið fyri Búnaðargrunnin | Stýrið fyrisitur grunnin. Búnaðargrunnurin varð stovnaður við tí endamáli at veita lán til landbúnaðin og fíggja kostnaðin av at reka jarðarumsitingina. | UVMR |
| Stýrið fyri Húsalánsgrunnin (Bústaðir) | At fyrisita Húsalánsgrunnin sambært løgtingslóg um Húsalánsgrunn, herundir sbrt. § 1 at virka fyri at øll í Føroyum skulu hava møguleika fyri at útvega sær ein bústað, at tryggja fjølbroytni á bústaðamarknaðinum og at stuðla undir Veðurlagspolitikk Føroya at minka orkunýtsluna hjá føroyska býlishópinum | Umhvorvi |
| Stýrið fyri Kringvarp Føroya | Stýrið fyri Kringvarp Føroya er ovasta leiðslan á stovninum og hevur yvirskipaðu ábyrgdina av, at ásetingarnar í lógini og øðrum fyriskipanum um virksemi stovnsins verða fylgdar. | AMMR |

| Nevnd | Endamál | Ráð |
|---|---|---|
| Stýrið fyri Listasavn Føroya | Stýrið er ovasta leiðsla á Listasavni Føroya. Landstýrismaðurin í mentamálum velur formannin í stýrinum. Tórshavnar kommuna, Listafelag Føroya og Felagið Føroysk Myndlistafólk velja hvør sín lim. Stýrið setur stovnsleiðaran eftir tilmæli frá Listafelag Føroya og Felagnum Føroysk Myndlistafólk | AMMR |
| Stýrið fyri sjálvsognarstovnurin DUGNA | Stýrið hevur evstu ábyrgd fyri virkseminum. | AMMR |
| Stýrið fyri Sjóndepilin | Stýrið hevur ábyrgd av virkseminum hjá deplinum, sum er at skipa fyri virksemi fyri blind og sjónveik við frálæru í ymiskum lærugreinum og vegleiðing í hjálpartólum. | AMMR |
| Stýrið fyri Tekniska Skúla í Klaksvík | Stýrið er ovasta leiðsla og hevur ábyrgd av skúlans virksemi. | BUMR |
| Tilbúgvingarráðið | Tilbúgvingarráð skal ráðgeva landsstýrismonnum í tilrættisleggingini av tilbúgvingini. | LMR |
| Tónleikaútflutningsstovan | Tónleikaútflutningsstovan skal virka fyri útflutningi av føroyskum tónleiki | UVMR |
| Trygdargrunnur fiskivinnunnar | Grunnurin hevur til endamáls at tyggja tí einstaka fiskimanninum inntøkutrygd. | FISK |
| Tryggingarráðið | Ráðið tekur avgerð í týdningarmiklastu eftirlitsmálunum og ráðgevur Tryggingareftirlitinum í sambandi við gerð av reglum. | UVMR |
| Tvingsilsnevnd | Tvingsilsnevndin tekur støðu til, um tilmæli um tvingsilsinntriv frá kommunum og Almannaverkinum kunnu góðkennast, samstundis sum nevndin eisini viðger kærur um framd tvingsilsinntriv og ávísar avgerðir hjá myndugleikunu. Nevndin tekur avgerðir eftir løgtingslóg nr. 73 frá 25. mai 2020 um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin, og løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur. | LMR |

| Nevnd | Endamál | Ráð |
|---|---|---|
| Útbúgvingarráðið fyri heilsuhjálpara- og heilsurøktaraútbúgvingar | Endamálið við nevndini er at fylgja gongdini innan heilsuútbúgvingar og viðgera uppskot um at broyta og endurnýggja hesar | BUMR |
| Útbúgvingarráðið fyri námsfrøðiligu hjálparaútbúgvingina | Ráðgeva landsstýrismanninum í málum viðvíkjandi námsfrøðiligu hjálparaútbúgvingini. | BUMR |
| Valstýrið, prósta- stiftsstjórnarval | Stjórnar valunum til próstadømisráðið og stiftsstjórnina | AMMR |
| Vanlukkutryggingarráðið | Ráðið tekur avgerð í málum um arbeiðsskaðatrygging og vinnusjúku. | Umhvorvi |
| Vinnuframagrunnurin (Vinnuframi) | Endamál grunsins er at styrkja og fjøltátta føroyskt vinnulív og menna burðardyggar føroyskar fyritøkur. Umframt at menna virksemi sum er, verður dentur lagdur á tøkni, bæði nýskapan í kendari tøkni og í framkomnari tøkni sum t.d. teldutøkni, lívtøkni og skapandi vinnu. | UVMR |
| Vinnusjúkugrunnurin | Endamáls grunsins er at fíggja og rinda endurgjald fyri vinnusjúkur. | Umhvorvi |
| Virðislønarnevndin | Nevndin ger tilmæli um, hvør ið skal fáa virðisløn. | AMMR |
| Vísindasiðsemisnevndin | Øll biomedisinsk gransking krevur góðkenning frá Vísindasiðsemisnevndini, sum í høvuðsheitum er øll gransking úr menniskjaligum tilfari. Endamál við nevndini er at skapa lógarkarmar fyri vísinda- etiskum metingum av biomedisinskum granskingarprojektum. At tryggja verju hjá royndarpersónum, sum luttaka í biomedisinskum granskingarprosjektum, samstundir at skapa møguleikar fyri nýggjari virðismiklari vitan innan økið. | HMR |
| Visitasjónsnevndin | Hevur til uppgávu, innan fyri teir karmar, ið eru ásettir av landsstýrinum, at: gera og dagføra leiðreglur viðv. ávísingum av sjúklingum uttanlands og viðgera ítøkilig visitasjónsmál um ávísing til kanning og viðgerð uttanlands. | HMR |

| Nevnd | Endamál | Ráð |
|---|---|---|
| Yrkisnevndin | Endamálið hjá yrkisnevnd er at viðgera mál innan viðkomandi útbúgvingar við støði í teimum heimildum, sum givnar eru í yrkisútbúgvingarlógini | BUMR |
| Yrkisútbúgvingarráðið | Endamál ráðsins er í høvuðsheitum at tilmæla og at ummæla mál viðvíkjandi yrkis- og arbeiðsmarknaðarútbúgvingum, samanber § 21, stk. 1 í yrkisútbúgvingarlógini | BUMR |
| Yvirfriðingarnevndin | Staðfestir allar avgerðir hjá friðingarnevndunum. Avgerðir hjá friðingarnevndunum kunnu kærast til Yvirfriðingarnevndina. | Umhvorvi |
| Yvirlandbúnaðarstevna Eysturoya Sýsla | Yvirlandbúnaðarstevnurnar virka sum dómstólar viðv. landbúnaðar- og jarðarviðurskiftum | UVMR |
| Yvirlandbúnaðarstevna Norðoya Sýsla | Yvirlandbúnaðarstevnurnar virka sum dómstólar viðv. landbúnaðar- og jarðarviðurskiftum | UVMR |
| Yvirlandbúnaðarstevna Sandoyar Sýsla | Yvirlandbúnaðarstevnurnar virka sum dómstólar viðv. landbúnaðar- og jarðarviðurskiftum | UVMR |
| Yvirlandbúnaðarstevna Streymoyar Sýsla | Yvirlandbúnaðarstevnurnar virka sum dómstólar viðv. landbúnaðar- og jarðarviðurskiftum | UVMR |
| Yvirlandbúnaðarstevna Suðuroyar Sýsla | Yvirlandbúnaðarstevnurnar virka sum dómstólar viðv. landbúnaðar- og jarðarviðurskiftum | UVMR |
| Yvirlandbúnaðarstevna Vága Sýsla | Yvirlandbúnaðarstevnurnar virka sum dómstólar viðv. landbúnaðar- og jarðarviðurskiftum | UVMR |
| Yvirútskiftingarnevndin | Viðger kærur um útskifting o.a | Umhvorvi |